# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

7. august fingu Mariann Solmunde og Hallur Hentze, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3300 gr.

10. august fingu Ann-Lisa og Hans Arne Niclasen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4680 gr.

11. august fingu Marjun Hentze og Christian Djurhuus, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3030 gr.

12. august fingu Ann Tordis K. Hellisdal og Jónleif Eliasen, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4600 gr.

12. august fingu Erla og Áki Mortensen, Tórshavn, ein son. Hann var 59 cm. langur og vigaði 4850 gr.

14. august fingu Maj Johannesen og Heini Fosaa, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4100 gr.

15. august fingu Ingibjørg Hansen og Martin Dahl, Hvalvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3650 gr.

15. august fingu Anne Mette Greve Klemensen og Leif Hansen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3200 gr.

15. august fingu Sonja Gleðisheygg og Andre Magnussen, Norðragøta, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

16. august fingu Helena Mortansdóttir, Tórshavn og Dávur P. Jacobsen, Søldafjørður, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3250 gr.

17. august fingu Irdi Lið Johansen og Jørgin Gaardlykke, Miðvágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr.

18. august fingu Jóhanna við Streym og Jóhan Heiðrikur Mouritsen, Hoyvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4600 gr.

18. august fingu Eydna og John Ísheim, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4300 gr.

19. august fingu Mildrid Jacobsen og Páll Nólsoy, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

## Andlát

12.08
Elin Sólva Petersen, vanliga nevnd Elin í Puntabyrgi, Tvøroyri, 61 ár.
Jóhanna Frederikka Høgnesen í Klaksvík, ættaða frá Gjógv, 86 ár.

13.08
Greta Jespersen, í Havn, 79 ár.
Johannes Hendriksen, í Sørvági, 86 ár.
Emma Guðjónsson, úr Leirvík, 79 ár.
Ingolv Joensen, 73 ár.
Eywind Dalsgaard Henriksen, sonur Jenny Dalsgaard og Jónbert Henriksen, ættaður úr Skálavík, búsitandi í Grindsted, 20 ár.

15.08
Poulina Jónsdóttir, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Gærðabað í Íslandi, 74 ár.
Ingrid Midjord, ættað úr Vestmanna, búsitandi í Tórshavn, 79 ár.
Regin Hansen, ættaður úr Nólsoy, búsitandi í Havn, 70 ár.

16.08
Tummas Poulsen á Argjum, 43 ár.
Jallgrím Poulsen, Saltangará, 60 ár.

17.08
Wensil Olsen, 97 ár.

18.08
Ólavur Guðmundsson, 91 ár

## Alfred Klein 85 ár



Komandi sunnudag, tann 22. august, fyllir Alfred Klein í Fuglafirði 85 ár.

Alfred er ættaður av Hellunum, men kom rættuliga ungur til Fuglafjarðar. Hann giftist við Dianu Klein, ið eisini var av Hellunum. Tey settu búgv í Fuglafirði.

Alfred hevur verið ein sjáldsamur maður í mangar mátar, og ein sera raskur maður. Sum ungur fór hann til skips, sum so mangir av hansara aldri vóru.

Seinni gjørdist hann fastur landari hjá Havsbrún. Hetta starv røkti hann í samfull 30 ár í trúskapi.

Alfred hevur eisini verið seyðamaður í heili 60 ár, og hann hevur verið sera gløggur við at kenna væl seyð. Ikki einans tann seyðin sum gekk í haganum har hann røktaði, men eisini grannaseyðin, og tann seyðin sum gekk millum húsini um veturin – áðrenn seyðurin bleiv stikaður úti.

Eitt annað sum sermerkir Alfred, er at hann er sera søguríkur maður. Hann veit sera nógv at greiða frá, hendingum og ættarfólki. Tað er ofta ein fragd at koma á tal við hann.

Sum organisatiónsmaður hevur hann verið trúgvur ímóti teimum feløgum, ið hann hevur verið limur av, til dømis Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag og pensiónistafelagnum í Fuglafirði.

Góði Alfred, vit fara at ynskja tær ein góða tíð framyvir, og at Guds signing fylgir tær.

**Símin P. Poulsen**

## Minningarorð um Beggu Eidesgaard

frá starvsfeløgunum á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi:

Summarið er aftur komið, tað er so stutt síðani seinasta summar, ja, tíðin gongur ógvuliga skjótt.

Veðrið er ikki altíð so gott, men tað er ljóst og nakrir góðir dagar eru altíð við sól.

Vit her á Ellisheiminum kunnu fara ein túr út í garðin, tá veðrið er til vildar. Her kunnu bú- og starvsfólk hava nakrar góðar løtur saman.

Í garðinum kunnu vit njóta tað góða veðrið og sum altíð tann vakra urtagarðin við teimum vøkru blómunum og trøðunum. Vit minnast blómurnar og trøðini, ið vóru her seinasta summar, men sum altíð er onkur blóma, ið ikki er uppafturkomin, sum ikki hevur klárað veturin.

Soleiðis er eisini hjá okkum. Tað er altíð onkur, sum ikki er ímillum okkum meira, tá summarið kemur, men vit minnast tey, vit sakna tey. Sjálvt um lívið heldur áfram og vit fylgja við, so vilja tey altíð vera ein partur av okkum. Tey hava livað her, verið ímillum okkum og vit goyma minnið um tey í hjørtum okkara. Soleiðis liva tey víðari.

Begga arbeiddi á Ellisheiminum í nógv ár. Hon búði í Vági, so hon koyrdi til arbeiðis um Hovseggina øll hesi árini. Hon hevur óivað havt nógvar góðar, men eisini nógvar strævnar túrar.

Begga var góð við búfólkið og tey við hana, hon fylgdi teimum gjøgnum nógv ár. Tað var ógvuliga tíðningarmikið fyri hana, at tey høvdu tað gott. Hetta vísti hon í sínum arbeiði.

Ellisheimið hevur fingið ein buss til búfólkið, so tey saman kunnu sleppa túrar her í Suðuroynni, vitja aftur til heimbygdina, sum tey eru flutt úr.

Tað var strævið at savna pening, hildnir vóru marknaðardagar o.a. Begga, sum dugdi so væl til hendurnar, gjørdi nógv vakurt, sum selt varð til frama fyri bussin. Hon var drívkraftin, ið fekk okkum at trúgva, at tað var gjørligt.

Familjan hevði nógv at týða fyri Beggu. Hon tosaði ofta um synirnar hjá sær, hvar teir vóru, hvat teir tókust við, tað sást á henni, hvussu góð hon var við teir. Hon ynskti teimum, sum mamma, alt tað besta. Teir vóru altíð í hennara tonkum.

Begga bardist til tað síðsta ímóti sjúkuni, vildi fylgja Magna og synunum víðari á lívsleiðini, men soleiðis skuldi tíanverri ikki verða.

Tað er so nógv, ið vit kundu skriva, minnir um góðar arbeiðsløtur og aðrar góðar løtur saman við Beggu.

Vit hava fingið eina sera vakra mynd av Vágsbygd frá Magna, til minnis um Beggu. Stóra tøkk fyri tað Magni, vit eru sera takksom fyri hana.

Góði Magni, René og Djóni við familju, Guð styrki tykkum á lívsleiðini.

Góða Begga, takk fyri alt.

## BRÚÐLEYP

Í dag 21. august giftast Súsanna Jacobsen og Jan Terji Nielsen í Havn. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum. Eftir kl. 19.30 verður vælkomst í Pætursgøtu 23. (Løgmannabreyt). Øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag 21. august kl. 15.00 giftast í Hvalvíkar Kirkju, Annika Sørensen, Tórshavn, og Karl Andreasen, Streymnesi. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00

Í dag 21. august kl. 14.30 giftast í Betesda í Klaksvík Elsebeth Heinesen og Jón Kári Frederiksen, Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Norð kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, kunnu boða frá á tlf. 455866, 215899 ella 229176 áðrenn 7. august.

Í dag 21. august giftast í Christianskirkjuni, Olevina Jacobsen og Dávið K. Sundsskarð, bæði úr Klaksvík. Vígslan verður kl. 15.00. Veitslan verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 18.30. Brúðarhús verður sunnudagin 22. august á Fosságøtu 28, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## SILVURBRÚÐLEYP

Mikudagin 18. aug. høvdu hjúnini Hildigunn og Agnar Poulsen verið gift í 25 ár. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum leygardagin 21. aug.

## FØÐINGARDAGAR

Sunnudagin 22. august verður Andrea Góðadal 80 ár. Dagurin verður hildin á vallaraheiminum á Giljanesi frá kl. 18.00. Øll eru hjartaiga vælkomin

Sunnudagin tann 22. august verður Jens Jacob í Hjøllum, Toftir, 80 ár. Dagurin verður hildin við vælkomst kl. 17 á Svangaskarði

Sunnudagin verður Alfred Klein, Fuglafirði, 85 ár. Dagurin verður hildin í Lonini leygarkvøldið kl. 19.00.

## PRÓGV

30. juli 2004 hevur Guðrun Sunadóttir Rasmussen, Tórshavn, lokið prógv í skrivstovuyrkinum við almennari umsiting sum sergrein. Læruplássið var Lejre Kommune í Danmark.

Marianna Mørkøre, Hvítanes, hevur fingið prógv sum BA (Hons) Fashion Promotion á Ravensbourne College of Design and Communication, London.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tóta og Oda 60 ár



*Tvíburasystrarnar Tóta Sørensen og Oda Andreasen sum fylla 60 ár í dag*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Leygardagin 21. august fylla tvíburasystrarnar Tóta Sørensen og Oda Andreasen í Havn 60 ár.

Tær eru úr Havn, døtur hjá Petrinu, f. Müller, ættað úr Porkeri, og Thorvald Andreasen, skipara, ættaður av Norðskála.

Barnaskúlan gingu tær í Nunnuskúlanum. Báðar eru tær sjálvstøðugar vinnurekandi og arbeiða í sama grannalag í miðbýnum í Havn, Tóta sum frisør og Oda sum zoneterapeutur. Eisini hava báðar verið aktivar í fimleiki.

Tóta lærdi til frisør hjá Juttu Andreasen á "Glade Hjørn" frá 1960-64. Síðan arbeiddi hon sum frisør í Danmark í fimm ár.

Heimaftur komin í 1969 fekk hon sær egna frisørsalong í J. C. Svabosgøtu í Havn. Har var hon til 1977, tá hon flutti inn í Voguebygningin í M. Heinasonargøtu. Í 1987 flutti hon inn í egnan bygning við nýggjari salong í somu gøtu.

Gjøgnum árini hava umleið 25 frisørlærlingar tikið útbúgving á Salong Tótu.

Tóta hevur gingið á odda í arbeiðinum at menna hárfríðkanarfakið í Føroyum og var við til at stovna Hárfríðkanarfelagið, har hon hevur verið í nevndini og var formaður í nógv ár.

Hon er limur í fakligu nevndini í Tekniska Skúla og var í mong ár varalimur í Havnar Handverksmeistarafelag.

Oda fór til Danmarkar, har hon fekk sær útbúgving. Í 1974 var hon útbúgvin sum pleygari, í 1980 sum sjúkrahjálpari og sum zoneterapeut í 1983.

Hon arbeiðir bæði sum zoneterapeut við egnari viðgerðarstovu og sum pleygari á deild 6 á Landssjúkrahúsinum.

Oda hevur havt tveir næmingar á FDZ-skúlanum (Forenede Danske Zoneterapeuter), sum hava verið í praktikk hjá henni, og arbeiða í dag sum sjálvstøðugir zoneterapeutar, onnur í Danmark og hin í Føroyum.

Tóta eigur børnini Johnny og Barbaru, sum bæði búgva í Danmark, hon eigur 5 ommubørn.

Oda eigur børnini Thorvald, sum býr á Syðradali á Streymoy, og Brynhild og Birgir sum búgva í Havn, hon eigur 9 ommubørn.

Tey ið vilja gleða tær á degnum eru vælkomin í Sjónleikarhúsið leygardagin 21. august millum kl. 11 og 18.



## Leon Gunnari til minnis

*Í dag sita vit eftir og kennast ikki við*
*hetta ófrættatámið, ið køvdi sólina*
*fyri okkum.*

*Eingin okkara dugir at svara tí*
*uppá hesar óhugnaligu spurningar hví??*

*Í dag, góði Leon Gunnar, standa vit á berum.*
*Eingin okkara hevur nakað nøktandi svar*
*uppá spurningar, ið vit øll settu.*
*Í dag eru vit øll prísgivin, tí vit hvørki duga*
*ella megna at skilja tað, ið hendi.*

*Tú fekk nøkur ár, ið vit ongantíð gloyma,*
*men nú ert tú farin, og um teg vit droyma,-*
*droyma dreymar tú sjálvur hevði,*
*men lagnan á hesar dreymar køldu hond sína legði.*

*Nú ert tú farin, aftur ikki nú vendist,*
*men svárari neyð aldri nøkrum okkara kendist.*
*Tú vart lívið mitt í lívinum,*
*og tessvegna duga vit - og vilja heldur ikki - góðtaka*
*hetta høpisleysa, ið skelkaði okkum øll -*
*men lagnan er ikki í okkara hondum.*

*Nú ert tú heima, har KRISTUS er kongur,*
*og nú kann einki skaða teg longur.*

**RV**

## Minningarorð um Hans Oluf Johannesen

**Føddur: 20.02.1954**
**Deyður: 01.03.2004**



Skelkandi vóru boðini at fáa. Hans Oluf var brádliga deyður bert 50 ára gamal. Tað er í slíkum løtum, at tankarnir reika, orð eru so ómetaliga fátøk, og spurningurin um hví fáa vit ongantíð svar uppá.

Hans Oluf var heilt frá barnsbeini av hugtikin av sjónum. Minnist mangar summarferiur norðuri á Norðtoftum, tá ið vit sum børn spældu í fjøruni ella í ánni. Hans Oluf var altíð tann, sum bygdi bát ella flaka. Og tað var eisini hann, sum stílaði fyri, hvar vit skuldu flota, og hvør skuldi vera við. Hans Oluf treivst sera væl, tá ið hann slapp at vera "skipari". Altíð blíður og við sínum eyðkenda smíli, fekk honn okkum at fáa kensluna av, at vit veruliga høvdu ein, sum kundi stýra okkara vesaligu sjálvbygdu skútu.

Í skúlaárunum kom Hans Oluf ofta inn á gólvið hjá okkum í Nólsoyar Pálsgøtu at vitja. Hann vildi altíð hava at vita, hvussu Julianna fastir hevði tað, og eg veit, at hetta var nakað, sum foreldur míni settu stóran prís uppá. Hetta at ein so ungur drongur, sum hann tá var, fann sær tíð til at seta seg niður og tosa um leyst og fast. Hans Oluf var ein persónur, sum tók sær tíð til at tosa, blídlyntur og tíl tíðir eisini skemtingarsamur. Hann ynskti, at øll, sum vóru rundan um hann, antin tað var familja ella vinir og kenningar, skuldu kenna seg væl og hava tað gott.

Sama dag, sum skúlatíðin í Klaksvík var at enda komin, mynstraði Hans Oluf við sluppini Sæborg, so av røttum kann sigast, at hugurin til sjógvin og sjólívið lá honum innast í barmi. Hans Oluf tók skipsførararprógv og sigldi nøkur ár úti. Men hugurin til egið skip og at fiska var nakað, sum lá Hans Olufi upp á hjartað. So tey seinastu tíggju árini átti og førdi hann Kvikk, og mangar vóru tær greipurnar, sum hann kom við til Julionnu fastur, tá ið Kvikkur var heima.

Seinast eg tosaði við Hans Oluf, hitti eg hann uttan fyri Apotekið í Klaksvík. Tá hevði hann verið og heintað heilivág, tí heilsan var farin at bila. Men sum hann sjálvur helt fyri: Men tað man fara at ganga.

So skuldi ikki verða. Hans Oluf andaðist umborð á egnari skútu og úti á tí, sum hann, sum unglingi hevði stóran tokka til. At hetta skuldi verða seinastu ferð, at vit bæði hittust, er torført at skilja. Og tí leita tankar mínir til tín góða Jóna, Katrin og John, sum hava mist ein góðan mann og pápa. Jóannes og Rannvá við famiIjum og til tín góða Sunneva, sum skuldi uppliva at missa Hans Oluf í bestu árum. Má Harrin troysta, ugga og styrkja tykkum í stóru sorg tykkara.

Friður verið við minninum um systkinabarnið Hans Oluf Johannesen.

**Hønefoss tann 08.08.04**

**Elsa**

## Dagurin

**21. august.** Sálomon. Til minnis um hin vísa kongin Sálomon, sum sagt er frá í kapitlunum 1-11 í fyrru kongabók í Gamla testamenti.
Navnið merkir friður og vælferð.

**22. august.** Symphorianus, deyður umleið ár 180, Kristin ungur maður úr Autun í rómverska landinum Galliu (Suðurfrakland). Varð tikin av døgum av tí at hann ikki vildi tilbiðja skurðgudamyndir í Cybeletemplinum.

**23. august** Sakeus, deyður umleið ár 116. Í elsta listanum yvir biskupar í Jerusalem verður nevndur ein Sakeus, sum er tann fjórði í tí biskupatalinum, men annars ókendur. Summi halda, at her verður sipað til yvirtollarin Sakeus (Luk. 19, 1-6)
Navnið merkir *reinur ella sakleysur*